# Í dag hjálpir Harrin

**– Tað er ongantíð ov skjótt at koma til Jesus. Jú fyrri vit koma, tess størri innihald fáa dagarnar á jørðini. Jesus er ein dýrgripur, sum bara veksur í virði, segði Jógvan Fríðriksson, biskupur í prædiku síni í Oyndarfjarðar kirkju 2. sunnudag í advent. Vit prenta her prædikuna:**



*- Náðitíðin er meira enn vøka og svøvnur. Talan er heldur um, hvussu vit liva teir tímarnar vit vakja, og hvussu vit leggja okkum at sova*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í lívsins skiftandi forløgum leita vit mangan eftir einari lagaligari løtu. Nær er tað hóskandi at siga tað, sum sigast skal? Nær er hin lagaliga løtan at gera tað, sum gerast skal? Nær er ein hóskandi løta til sátt og semju, at fáa alt tað í rættlag, ið líkasum tyngir og darvar.

Eisini tá talan er um andalig viðurskifti leita vit eftir einum hóskandi høvi. Skriftin er greið í hesum máli, og tosar um dagin í dag. Dagurin ígjár er farin, morgindagurin er ikki komin, - men í dag er Harrin at finna. »Í dag, um tit hoyra rødd hansara, tá forherðið ikki hjørtu tykkara, eins og í beiskleikanum freistingardagin í oyðimørkini" (Hebr. 3,7). Sjálvt um skriftin talar um farnar dagar, upphav heimsins, skapan og endurskapan. Sjálvt um hon sigur søguna um Jesus, og talar um komandi tíðir. Sjálvt um skriftin bæði hyggur aftur í tíðina og lítur frameftir, - so er tað tó altíð talan um tíðina nú og dagin í dag.

---

Tað er ein lítil søga við heitinum "Nær eiga vit at venda um?" Søgan er ein samtala millum ein eldri mann og ein ungan drong. Hin eldri maðurin hevði livað saman við Jesusi í nógv ár, og hvíldi í trúnni á Kristi fullgjørda verk. Hin ungi maðurin var søkjandi, leitað eftir eini hvíld, ið kundi skapa frið í eitt bivandi hjarta. Ein dagin møtast hesir báðir, og samtalan byrjar líkasum av sær sjálvum.

- Nær heldur tú, at tað er hóskandi at venda um?, spurdi unglingin hin gamla mannin.

- Tað kann gerast dagin fyri at ein doyr!, svaraði hin gamli.

Unglingin gjørdist ikki sørt bilsin. Minst av øllum hevði hann væntað eitt slíkt svar frá hesum gamla trúgvandi manninum. Undrandi spurdi hann uppaftur: - Men hvør veit og hvør kennir tíðina, tá vit skulu doyggja?

- Tað kann meiri enn so henda í morgin, svaraði hin gamli.

- Íðan, so skuldi eg altso vent um í dag, segði hin ungi og hugsaði djúpt og álvarsamt.

Hin gamli svaraði kærleiksfullur og sáttliga: - Ja, vinur mín. Ein so týdningarmikil avgerð eigur ikki at verða útsett. Í morgin kann tað gerast ov seint!

--

Sjálvt um søgan er einføld, er hon í stuttum ein neyv lýsing av evangeliska veruleikanum. Vit hoyra gleðiboðskapin um frelsu og ævigt lív. Vit fáa høvi at ganga yvirum frá deyðanum til lívið. Vit eiga ein frelsara, ið er deyður fyri alla synd heimsins. Tað ber til at ogna sær tað æviga lívið, alt vegna Jesu miklu náði og fullgjørda verk hansara á Golgata.

**Náðitíðin**

At seta út, er sjáldan gagnligt. Tað kann henda seg, at tað tímiliga er ein vinningurin at vera tolin og bíða, bíða í dagar og ár. Andaliga er tað øðrvísi. Tað er ongantíð ov skjótt at koma til Jesus. Jú fyrri vit koma, tess størri innihald fáa dagarnar á jørðini. Jesus er ein dýrgripur, sum bara veksur í virði. Hann er hin sami í dag, sum í gjár og til ævigar tíðir. Og tó er Jesus størri og dýrari fyri hvønn dag, vit fáa náðir at fylgjast við honum. Hann er ein undurfullur frelsari og menniskjans besti vinur.

Nú er lagaliga løta,
hirðans rødd her kallar teg
opin stendur lívsins gøta
- atgongd frí á himnaveg

Náðitíðin – hetta ríka og álvarsama orðið. Tíðin, tá Guds náði streymar móti menniskjum. Fyrigeving syndanna og ævigt lív. Ein frið á jørðini, sum hesin heimur ikki eigur at geva. Ein gleði, reinari enn øll onnur.

Náðitíðin – hetta ríka og álvarsama orðið. Einaferð vóru tað 10 moyggjar, sum tóku lampur sínar og fóru út at møta brúðgóminum. Men við tað at brúðgómurin dvøldi við at koma, kom tyngd á tær allar og tær sovnaðu.

Tær 10 moyggjarnar livdu í náðitíðini, og tær sovnaðu, meðan náðitíð var. Eingin kann vakja ævigt her niðri á jørðini, og neyðugt er at sova. Náðitíðin fevnir yvir bæði likamliga vøku og svøvn.

Men náðitíðin er meira enn vøka og svøvnur. Talan er heldur um, hvussu vit

## Tær 10 moyggjarnar

Tekstur: Matteus, kap. 25, ørindini 1-13: **v1** Tá skal himmiríkið verða líknað við tíggju moyggjar, sum tóku lampur sínar og fóru út at møta brúðgóminum. v2 Men fimm teirra vóru óhygnar og fimm hygnar. **v3** Tí at hinar óhygnu tóku lampur sínar, men tóku onga olju við sær; **v4** men hinar hygnu tóku olju við í konnum sínum aftrat lompum sínum. **v5** Men við tað at brúðgómurin dvøldi við at koma, kom tyngd á tær allar, og tær sovnaðu. **v6** Men um midnátt kom róp í: »Sí, nú kemur brúðgómurin! Farið út at møta honum!« **v7** Tá vaknaðu allar hesar moyggjarnar og fóru at gera lampur sínar til. **v8** Men hinar óhygnu søgdu við hinar hygnu: »Latið okkum fáa eitt sindur av olju frá tykkum, tí at lampur okkara slokna.« **v9** Men hinar hygnu svaraðu og søgdu: »Nei, tað fer ikki at røkka til hjá okkum og hjá tykkum við. Farið tit heldur til teirra, ið selja, og keypið tykkum sjálvum.« **v10** Meðan tær nú fóru avstað at keypa, kom brúðgómurin; og tær, ið búnar vóru, fóru við honum inn til brúdleyps; og dyrnar vórðu latnar aftur. **v11** Men seinni komu eisini hinar moyggjarnar og søgdu: »Harri, harri, lat okkum upp!« **v12** Men hann svaraði og segði: »Sanniliga sigi eg tykkum, eg kenni tykkum ikki.« **v13** Vakið tí, tí at tit vita hvørki dagin ella tíman!